**Semja**

**millum**

**Fysioterapeutfelag Føroya og Ergoterapeutfelagið**

**øðrumegin**

**og**

**Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

**hinumegin**

**Sáttmálaskeið og lønarhækkanir:**
Verandi sáttmáli verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. januar 2023 til 1. januar 2026.
Semjan byggir á ein karm á 3,8% fyri 2023, 4,2% fyri 2024 og 4,75% fyri 2025.

Tann 1. januar 2023 hækkar lønin 3,8%.
Tann 1. januar 2024 hækkar lønin 4,2%.
Tann 1. januar 2025 hækkar lønin samsvarandi lønartalvuni fyri 2025.

**Yvirflyting í nýggja lønartalvu í 2025:**
Tann 1. januar 2025 flyta terapeutar soleiðis, við sama starvsaldri:

Tey sum eru á lønarstig 1 flyta á lønarstig 1

Tey sum eru á lønarstig 3 flyta á lønarstig 2

Tey sum eru á lønarstig 5 flyta á lønarstig 3

Tey sum eru á lønarstig 9 flyta á lønarstig 4

Tey sum eru á lønarstig 17 flyta á lønarstig 5

Terapeutar sum undirvísa á Heilsuskúlanum eru á stig 6

Skalagongdin hjá leiðarum:

Varaleiðarar, sum eru á stig 28 flyta á stig 7
Leiðandi terapeutar í kommunalu heilsutænastuni, sum eru á stig 30 flyta á stig 8
Leiðandi terapeutar á sjúkrahúsunum, sum eru á stig 30 flyta á stig 8
Leiðandi terapeuturin á Landssjúkrahúsinum og stovnsleiðarar, sum eru á stig 35 flyta á stig 9

**Ásetingar um barnsferð í § 16**

Starvskvinna, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir fyri metta føðing.
*Stk. 2.* Starvskvinna, ið er við barn, hevur rætt til barsilsfarloyvi av viðgongu og barnsburði. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, kann starvskvinnan fara úr arbeiði við løn fram til føðing. Eftir føðing fær starvskvinnan farloyvi við løn í 24 vikur. Barsilsfarloyvið við løn kann soleiðis vera bæði styttri og longri enn 28 vikur tilsamans, men eftir føðing eru altíð 24 vikur við løn.
*Stk.3.* Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín. Hesar 10 vikurnar við løn kunnu liggja innan alt farloyvistíðarskeiðið tó eftir viku 14.
Hendan ásetingin fær gildi fyri børn fødd eftir 1. oktober 2024.

**Broytingar í sáttmálatekstinum**
Partarnir eru samdir um broytingar í sáttmálunum og verða sáttmálarnir dagførdir samsvarandi.

Í Tinganesi 15. desember 2023

Fyri

Fysioterapeutfelag Føroya og Ergoterapeutfelagið

Augusta Mikkelsen, forkvinna og Erling Pætur á Argjagarði, formaður

Fyri

Kommunala Arbeiðsgevarafelag

Per Martin Gregersen, formaður og Anita Fuglø, leiðari

Fyri

Fíggjarmálaráðið

Ruth Vang, landsstýriskvinna og Súsanna Nolsøe, fulltrúi